## Semja í Zimbabwe

Stjórnin og andstøðan í Zimbabwe samdust í nátt um, hvussu tað politiska valdið skal býtast teirra millum. Eftir samráðingar í 14 tímar kunngjørdi suðurafrikanska stjórnin, sum hevur virkað sum semingsmaður, at partarnir vóru samdir um valdsbýtið. Eftir semjuni skal andstøðuleiðarin, Morgan Tsvangirai, taka við sum forsætisráðharri tann 11. februar, og Robert Mugabe skal halda fram sum forseti. Stjórnin og andstøðan hava stríðst um valdið síðani forsetavalið í mars í fjør. Tá skuldsetti andstøðan stjórnina fyri valsvik.

# Nógv at spara

**- Tað er hópur av peningi at spara við lágorkubygging, sigur danin, Frank Petersen, sum øtast yvir, hvussu illa nógv hús í Føroyum eru bjálvaði**

BYGGING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Neyðugt er við nýhugsan innan húsabygging...*

Frank Petersen, sum eigur donsku fyritøkuna Bozel, hevur sæð nøkur hús á ferðini í Føroyum, og hann sigur seg øtast yvir, hvussu illa mong av hesum húsum eru bjálvaði.

- Eg eri púrasta sjokkeraður og nógv av tí, ið bygt verður í Føroyum, hevði verið púrasta ólógligt, um slík bygging fór fram í Danmark í dag.

Frank ivast onga løtu í, at føroyingar kunnu spara hópin av peningi í orku, um rætt verður atborið.

Hann sigur, at vánaliga bjálvingin merkist í næsunum, tá tú kemur inn í hús, sum eru illa bjálvað.

- Rúmini eru køld, veggirnir eru kaldir, og fuktigheitin stingur í næsarnar. Hetta er ikki gott fyri heilsuna hjá fólki.

Frank vísir á, at tíðin er farin frá vanahugsan, bæði í Danmark og í Føroyum.

- Eg fái ilt í búkin, tá eg síggi keðiligu bygningarnar í Danmark – og nú eisini í Føroyum. Hugflogið er bæði goymt og gloymt, sigur Frank Petersen.

Tað var av tilvild, at Frank kom inn í byggivinnuna, og nú hevur hann nógv at gera við at sniðgera hús, sum skilja seg burtur úr mongdini.

Næstan alt legur seg gera, og hugflogið hjá dananum er stórt.

- Hann hevur hugskotini, teknar nakrar tjúkkar blýantstrikur og letur so fakfólk fremja hugskotini í verki, sigur Gilli Trónd, sum eisini verður við á temakvøldinumumlágorkubygging í Miðlahúsinum í annaðkvøld.



*Tað ræður um at bjálva húsini væl...*


